ALMANNA- OG BÚSTAÐAMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Social Affairs and Housing

Føroya Vanlukkutryggingarráð
Óðinshædd 11
FO-100 Tórshavn
Vanlukkutrygging@arb.fo

23. oktober 2026
Mál: 26/25812
Tygara skriv:
Viðgjørt: ARØ

Javning av upphæddunum í arbeiðsskaðatryggingarlógini

Sambært § 43 í løgtingslóg nr. 67 frá 25. mai 2009 um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða verða tær í § 42, stk. 6, § 57, stk. 2, og § 59, stk. 1 nevndu upphæddir javnaðar við broytingini í tí til eina og hvørja tíð galdandi høvuðssáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag og avrundaðar til nærmastu 100 kr. Endurgjald, ið verður veitt sum framhaldandi árlig veiting sbrt. § 50, verður javnað á sama hátt.

Upphæddirnar verða javnaðar av landsstýrisfólkinum eftir tilmæli frá Vanlukkutryggingarráðnum.

Í brævi, dagfestum 8. oktober 2026, hevur Vanlukkutryggingarráðið mælt til, at nevndu upphæddir verða javnaðar soleiðis:

	1/1-2027 (2,58 %)
§ 42, stk. 6	kr. 556.400 kr.
§ 57, stk. 2	kr. 927.600 kr.
§ 59, stk. 1	kr. 227.200 kr.

Landsstýriskvinnan skal boða frá, at tikið verður undir við tilmælinum, og at tær soleiðis javnaðu upphæddirnar verða almannakunngjørdar sbrt. § 43, stk. 2 í arbeiðsskaðatryggingarlógini, og at endurgjøld sbrt. § 50 verða javnað við sama prosenttali.

Vinarliga

Margit Stóra
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen